

# MAZDA 626 GLX 2.0 TD
## HATCHBACK

Árg. 10/1998 Km. 148000
Litur: Myrkt grønur
Fjarstýrt centrallás
El-rútar aftan og framan,
El-spegl, Air con.
Píkadekk á felgum fylgja við

**Tlf. 373 985**

*Prísin kunnu vit tosa um*

Gallarí Jinx



Hergerð Joensen
Framsýning í august 2004

tel 317101 • jinx@jinx.fo

# Felagsskúlin á Oyrarbakka

Í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2004/05 verður søkt eftir lærara, sum kann undirvísa í støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði og kunningartøkni í framhaldsdeildini.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá skúlastjóranum á tlf. 422084, 423098 ella 229885.

Umsóknir saman við ljósriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Felagsskúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. august 2004.

**Skúlastýrið fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka**
v/ Hans Erland í Brekkunum
400 Oyrarbakki

# Koyrikort?

Nýggj teoriskeið
til persónbil, byrja
**mánadagin 16. august**
kl. 17.30

FØRARASETRIÐ
K O Y R I S K Ú L I

Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99 • 21 10 96
John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# Lærarastarv við Gøtu skúla

**Við Gøtu skúla er hetta starv leyst at søkja í skúlaárinum 2004/2005.**

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2004/2005. Starvið er fulltíðarstarv.

Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í gentuítrótti og kreativum lærugreinum, hava fyrimun.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkum 18.1-27.4.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi mikudagin. 18. august 2004.

Um nærri upplýsningar ber til at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 441484 ella 210959.

**Gøtu Skúlastýri**
v/ Páll Jacobsen
510 Gøta

Gøtu Kommuna

# Søkt verður eftir fólki

at arbeiða kvøld- og vikuskiftisvaktir. Helst yvir 18 ár. Byrja skjótast gjørligt.

**Kvikkeyp, tlf. 512480**

Teoriskeið í Eysturoynni!

# Koyrikort til motorsúkklu?

Nýtt teoriskeið byrjar
í Eysturoy
leygar**dagin 14. august**
kl. 15.00.

FØRARASETRIÐ
K O Y R I S K Ú L I

Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99 • 21 10 96
John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir ídnaðarlaboranti til starvsstovu okkara til setan 1. oktober 2004 ella eftir nærri avtalu.
Starvið er eitt fulltíðaravloysarastarv.

Starvið umfatar m.a. rávørueftirlit, eftirlit av lidnari vøru og framleiðslu av reagensum.

Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Landsstýri.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Eyðhild Christiansen ella Jonnu Hansen á tlf. 341100.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera Apotekinum í hendi áðrenn 1. september 2004.

**Tjaldurs Apotek**
Postsmoga 3010
110 Tórshavn

# Fimleikur – callanetice

Callanetice fimleikur byrjar týskvøldið 17. august.

Lærarar: Steintóra H. Nesá, tlf. 444720
Áshild Kristiansen, tlf. 444621

Tekning og nærri boð fáast frá lærarunum.

Luttøkugjald: Einaferð 200,- + 2 kr./tíma skal gjaldast fyrsta kvøldið!

**Fuglafjarðar Kvøldskúli**
**tlf. 444087**



ALMANNASTOVAN

# Løgfrøðingur til Almannastovuna

Søkt verður eftir løgfrøðingi til Stjórnarskrivstovuna at byrja skjótast tilber.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávurnar verða at:
- ráðgeva og vegleiða leiðsluni í løgfrøðisligum og fyrisitingarligum spurningum
- ummæla uppskot til lógir og kunngerðir
- málsviðgera í ávísum málum
- gera vegleiðingar
- tilevna kunningartilfar til almenningin og starvsfólk á Almannastovuni
- verða partur av tvørfakligum arbeiði á stovninum

**Førleikakrøv:**
Vit sóknast eftir einum umsøkjara, ið hevur
- løgfrøðisligt embætisprógv
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og málrættað og ikki er bangin fyri at átaka sær nýggjar og ókendar uppgávur
- góð samstarvsevni
- hegni at orða seg á føroyskum í skrift og talu

**Vit bjóða:**
- starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við fjølbroyttum avbjóðingum
- møguleika fyri fakligari og persónligari menning

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, ella Mariu Jacobsen, deildarleiðara á tlf. 35 35 10.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Almannastovuna**
Att.: Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri
J. Broncksgøta 27
Postrúm 3096
110 Tórshavn

Umsóknarfreist: 26/08-2004 kl. 9.00

TOYOTA COROLLA
T-sport 192 HK



ÁRG. JULI 2002 • KM 31.000 • 6 GEAR

TIL SØLU FYRI **190.000 KR**

**TEL 514716**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Bioanalytikari

Eitt fast starv sum bioanalytikari á Rannsóknarstovuni á Landsjúkrahúsinum er leyst til setan 1. oktober 2004.

**Rannsóknarstovan umfatar m. a.**
- kliniska biokemi
- kliniska immunulogi
- kliniska mikrobiologi
- kliniska fysiologi
- patologi

Blóðroyndir verða tiknar úti á bygd eina ferð um vikuna.

**Førleikakrøv:**
- bioanalytitikaraútbúgving
- góð samstarvsevni
- fleksibilitetur

Setanar- og lønarviðurskifti smb. galdandi sáttmál millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálastýrið.Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna við vaktskyldu (vakt frá heiminum)

Nærri upplýsingar fáast við at seta seg í samband við leiðandi bioanalytikara Ivy Hansen, tlf. 304500, lokal 5601, e-post ivyh@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 17. september 2004 kl. 12.00

Skrivlig umsókn í brævbjálva merktur »umsókn til starv« við CV, autorisatión, avrit av prógvum og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Navigatørur søkist

Søkt verður eftir einum navigatøri til at undirvísa á einum skiparaskúla í Grønlandi. Krav er, at umsøkjarar hava útbúgving sum skipsførari við royndum sum stýrimenn/førarar. Fyrimunur er at hava royndir innan undirvísing, men er hetta ikki krav, av tí at viðkomandi pedagogisk grundútbúgving verður latin tí, sum verður settur í starv.

Ynskiligt er at byrjað verður skjótast gjørligt og eru hús tøk til viðkomandi. Vit bjóða eitt spennandi og fjølbroytt starv, við góðum møguleikum fyri fakligari og persónligari menning.

Umhvørvið hevur eina ótrúliga náttúru, við møguleika fyri veiðu og fiskiskapi.

Nærri fæst at vita um løn, treytir og annað á heimasíðu okkara:

www.haraship.dk

**ella við at ringja á tel. +45 70203483**

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Útbúgvingar og framhaldsútbúgvingar á Føroya Læraraskúla

Í samstarvi við JyskCVU í Århus bjóðar Føroya Lærarakúli út hesar útbúgvingar og framhaldsútbúgvingar. Ætlanin er at byrja í september.

**Útbúgvingarnar eru hesar:**
**Samskifti, skipan og leiðsla (SSL).** Hetta er grundleggjandi leiðsluútbúgving fyri øll við leiðsluuppgávum, ella ætlanum um at taka tílíkar á seg, bæði í almennum og í privatum virki.
Útbúgvingin hevur verið 4 ferðir áður á Lærarakúlanum.
Luttakararnir hava tá í høvuðsheitum verið pedagogar og onnur í pedagogiskum arbeiði, eitt nú dagrøktarleiðarar og sjúkrarøktarfrøðingar.
Ongar ávísar førleikatreytir fyri upptøku.

**Námsfrøðiligt menningararbeiði – at broyta námsfrøðiliga siðvenju.** Hetta er grundleggjandi útbúgving í pedagogik við atliti til egið royndar- og menningararbeiði.
Luttakararnir hava tá í høvuðsheitum verið pedagogar og onnur í pedagogiskum arbeiði, eitt nú dagrøktarleiðarar og sjúkrarøktarfrøðingar
Útbúgvingin hevur verið 2 ferðir áður á Lærarakúlanum.
Ongar ávísar førleikatreytir fyri upptøku.

**Framhaldsútbúgvingarnar eru tvær diplomútbúgvingar.** Hesar útbúgvingar eru:

**Námsfrøðilig diplomútbúgving í sernámsfrøði:** Undirvísingarparturin **»Menniskja og sernámsfrøði«**, sum er ein av seks undirvísingarpørtum, og

**Diplomútbúgving í leiðslu:** Undirvísingarparturin **»Starvsfólk og leiðsla«**, sum er ein av seks undirvísingarpørtum.

Harumframt bjóða vit fram undirvísingarmodulið **»Vísindaástøði og leiðsla«**, sum er kravt modul til flestu pedagogisku diplomútbúgvingarnar. Modulið kann takast nú sum fyrireiking hjá teimum, sum ætla sær undir aðra diplomútbúgving enn hana, sum vit bjóða út í sernámsfrøði. Tey, sum tekna seg til sernámsfrøði, kunnu taka báðar samstundis.

**Upptøkutreytirnar** til diplomútbúgvingarnar eru lærara- ella pedagogútbúgving ella annar tilsvarandi námsfrøðiligur/teoretiskur førleiki. Haraftrat krevst viðkomandi vinnuroyndir í minst tvey ár.
Tilmelding innan 31. august.
Fleiri upplýsingar um útbúgvingarnar og framhaldsútbúgvingarnar eru á heimasíðu Lærarakúlans www.flsk.fo

Tórshavn 11. august 2004

**Føroya Lærarakúli**
Tlf. 313501
Teldupostur flsk@flsk.fo
Heimasíða www.flsk. fo